# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Berghild á Steig, Klaksvík**, andaðist á Ríkissjúkrahúsinum mánadagin 16. februar, 59 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara kæra

**Anne Margrethe Johannesen**

andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnumorgunin 15. februar 2009.

Kistan fer frá landssjúkrahúskapellinum í dag, mikudagin 18. februar kl. 17.00. Jarðarferðin verður úr Vestmanna kirkju hósdagin 19. februar kl. 14.00.

*Vegna tey avvarðandi*
**Joen Pauli Johannesen**

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

Bjarni Åkesson Filholm:

# Operation Valentine

Hálvføroyski rithøvundurin, Bjarni Åkesson Filholm í Hjørring, er nú aftur við eini nýggjari bók, sum enn einaferð snýr seg um føroysk viðurskifti.

Hesaferð er tað bókin "Operation Valentine – Anden verdenskrig på Færøerne", sum er um bretsku hersetingina av Føroyum 1940-45.

Bókin er skrivað á donskum, og høvdundurin sigur m.a. í fororðunum at tað er fáir danir sum kenna nakað til Føroyar og føroyska søgu. Meðan søgan um donsku hersetingina undir seinna heimsbardaga er vælkend í Danmark, eru tað fáir danir sum vita, at Føroyar um somu tíð vórðu hersettar av bretum.

Hóast nógv er givið út um krígsárini á føroyskum, heldur hann, at tað eisini er tørvur á at skriva søguna um hersetingina av Føroyum á donskum.

Umframt at "Operation Valentine – Anden verdenskrig på Færøerne" er ein bók við nógvum áhugaverdum myndum, er hon ein gjøgnumgongd av allari krígstíðini frá 1940 til 1945.



*Bjarni Åkesson Filholm við nýggju bók síni "Operation Valentine – Anden verdenskrig på Færøerne"*

Bjarni Åkesson Filholm er hálvur føroyingur, føddur í Vestmanna í 1952, og hevur føroyska mammu, Sonja Åkesson av Tvøroyri. Pápin, Palle Filholm, er dani sum arbeiddi eina tíð í Føroyum, tá hann var settur av løgtinginum sum verkfrøðingur og hevði eftirlit við vatnbyrgingum og havnabygging. Bjarni hevur skrivað fleiri bøkur um føroyska skipaferðslu- og mentunarsøgu. Hann hevur skrivað bøkur sum t.d. „Tjaldur" og „Norske Løve".

Tað er danska forlagið Forlaget Nautilus, sum gevur bókina út, sum er 128 blaðsíður. Bókin kann bíleggjast ella verður til keyps í føroysku bókahandlunum.

*mg*

**90 ára føðingardagur**
Í dag, 18. februar, fyllir Edvard Petersen, Hósvík, 90 ár. Føðingardagurin verður hildin í Kollafirði hjá Hervør og Tórgrím Hansen, Inni í Firði frá kl. 17.

**Dagurin**
**18. februar. Concordia**, deyð umleið ár 250. Lítið kend halgikona í fornkirkjuni.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*

**Prógv**

28. januar 2009 fekk Sarita Lindenskov Thomsen prógv sum sjúkrarøktarfrøðingur við Professions Bachelor frá Diakonissestiftelsens Sygepjeleskole í Frederiksberg.



## Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum mongu, sum á so ymiskan hátt hjálptu okkum, tá mín góði maður, okkara deiligi pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Hans Jacob Rasmussen**

kom heim og fór til gravar.
Takk til Smyril Line, sum førdi hann heim.
Takk fyri ta fløvandi móttøkuna í Vestmanna kirkju og til Agnar Nielsen fyri tey vøkru orðini.
Takk til Theodor Olsen, prest, fyri ta troystarríku taluna, takk til sangarar og berarar og ta stóru fjøld, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.
Takk fyri uppringingar og gávur, blómur og kransar.
Ein hjartans tøkk til familju og vinir fyri umsorgan og samkenslu undir hansara sjúkralegu og hjálpsemi í sambandi við jarðarferðina.

*Familjunnar vegna*
**Ivanda Rasmussen**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum fyri sýnda samkenslu, tá ið góða mamma, omma, langomma og vermóðir

**Oluffa Mouritsen**
Tórshavn

andaðist og varð jarðað.

*Moder, Moder, ak vort hjerte*
*er så fuld af tak til dig,*
*Vi, som aldrig helt kan fatte*
*hvad det er at miste dig.*
*Herren giver mange gaver,*
*her på jorden om ingen,*
*men han giver kun een moder,*
*hende får vi ej igen.*

*Fyri tey avvarðandi*
**Sissa og Pauli við familju**

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu, tá okkara kæra

**Gunneva Jensen**
Tvøroyri

andaðist og varð jarðað.
Vit takka hjartaliga øllum teimum starvsfólkum, sum hava verið um Gunnevu tey mongu ár, hon hevur verið á stovnum í Havn.
Tøkk til kirkjutænarar, sangarar og berarar,
Tøkk til Hera Joensen og Jónsvein Bech fyri troystarrík orð í sambýlinum á Fugloyarvegi 9 og í kirkjuni á Tvøroyri.
Tøkk fyri blómur og kransar og tøkk til tykkum øll, sum fylgdu henni til hennara síðsta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Meivør og Oddbjørg**